## Kreppan rakar Mærsk

Níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár fullu farmagjøldini fyri bingjuflutning sjóvegis 30 prosent samanborið við sama tíðarskeið í fjør, og tað sæst aftur hjá teimum reiðaríunum, sum hava bingjuskip. Eitt nú er umsetningurin hjá Maersk Line, sum er bingjudeildin hjá A.P. Møller-Mærsk, minkaður meiri enn 25 milliardir krónur. Tað sæst eisini aftur á úrslitinum. Til 1. oktober í ár var úrslitið 7,5 milliardir krónur í halli samanborið við 1,9 milliard í avlopi somu mánaðir í fjør, skrivar Ritzau. Maersk Line sigur, at samstundis sum farmagjøldini eru fallin, er farmurin eisini minkaður.




## Rúni Djurhuus heldur fram sum býráðslimur

Á seinasta býráðsfundi tók Rúni Djurhuus sæti fyri Elina Lindenskov úr Javnaðarflokkinum, sum hevði farloyvi. Á býráðsfundinum í kvøld fer Rúni Djurhuus aftur at taka sæti, hesaferð fyri Mariu Hammer Olsen, sum hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn 14 dagar. Rúni Djurhuus varð nummar seks á listanum hjá Javnaðarflokkinum til býráðsvalið seinast. Javnaðarflokkurin hevur fimm limir í Tórshavnar Býráð.

# Almennur diabetisfundur í Sandavági



*Tíðindaskriv*

Hin 14. november er altjóða diabetesdagur, og hesin dagur verður hildin um allan heim og tí eisini her heima hjá okkum. Hetta er vikuskiftið, tá ið nógvir stórir, kendir bygningar verða lýstir upp í bláum ljósi, - í serliga bláa litinum, sum ST brúkar, og serliga merkið er ein bláur ringur, sum skal vísa, at øll standa saman um at basa hesi álvarsomu sjúku, eisini ST og WHO, alheimsheilsufelagsskapurin. Lesið meira á www.worlddiabetesday.org

Í Føroyum verður altjóða diabetesdagurin í ár hildin í Sandavági, har Sandavágs kirkja verður upplýst í bláum liti frá fríggjadegi 13. november til mánadag 16. november.

Leygardagin kl. 15.30 verður almennur fundir í SÍF-húsdinum, har ymisk faklig evni verða umrødd.

Jens Andreassen, diabeteslækni: Staðfesting av diabetes typa-2.

May Britt Jacobsen, diabetesjúkrasystir: Viðgerð av diabetes typa-2.

Hans Petur Nielsen, hjarta-yvirlækni: Diabetes og hjartasjúkur.

Pál Weihe, yvirlækni og granskari: Diabetes typa-2, gransking í Føroyum

### »Life for a child« tiltakið

Fundurin er ókeypis, men burturluting verður í kaffisteðginum. Allur peningurin, sum kemur inn við lutaseðlasøluni fer óskerdur til altjóða barna tiltakið "Life for a child", sum roynir at útvega insulin til tey børn í heiminum, sum hava diabetes, og hvørs foreldur als ikki hava ráð til henda heilivág. Í dag eru eini 75.000 børn, sum liva undir hesum umstøðum og tíverri veksur hesin bólkur, tí gloppið millum tey ríku og tey fátøku í heiminum gerst størri fyri hvønn dag. Lesið meira um altjóða barnatiltakið á www.lifeforachild.org.

Fundurin er almennur og tað er okkara vón, at fólk møta fjølment at hoyra um diabetes, sum í dag –eisini í Føroyum - er ein nógv vaksandi sjúka.

Møguleiki er á fundinum at tekna seg sum nýggjan lim í diabetesfelagnum.

## Ung og mannarættindi á ungdómsdegnum 13. november

*Tíðindaskriv*

Hvat veit okkara ungdómur um mannarættindi og hvussu kann Amnesty International Føroya deild verða við til at geva eitt íkast soleiðis, at ungdómurin kennir síni rættindi? Hetta er ein av spurningunum Føroya deild hevur arbeitt við í seinastuni.

Fyrsta stig til at finna útav hvat ungdómurin veit um mannarættindi, hevur verið at gjørt eina spurnarkanning, sum næmingar í nøkrum av 9. flokkunum hava svarað.

Fríggjadagin 13. november skipar Føroya Ungdómsráð (FUR) fyri tiltøkum fyri ung. Amnesty International Føroya deild luttekur eisini á degnum. Umboð frá Føroya deild fara at vitja ein 9. flokk í Kommunuskúlanum.

Tveir tíma eru settir av til vitjanina. Tá er ætlanin, at umboðini hjá Føroya deild skulu geva næmingunum innlit í hvat mannarættindi snúgva seg um. Hetta verður gjørt við framløgum, stuttum filmssýningum, spæli og spurnarkapping.

Næstforkvinnan í Amnesty International Føroya deild Eyðgerð M. Kruse fer at greiða frá spurnarkanningini og frá úrslitinum.

Hava fjølmiðlarfólk spurningar, ber til at venda sær til samskiparan Jacobu Kruse, tlf. 515816 ella teldupostur: jkruse@amnesty.fo

**Amnesty International Føroya Deild**

# Rasmussen & Weihe eitur nú NOTA

**Grannskoðaravirkið Rasmussen & Weihe hevur nú skift navn og eitur Nota. Fyritøkum hevði navnið eftir gomlu stjórunum, Carl Vilhelm Weihe og Claus Rasmussen. Hvørgin teirra er longur í fyritøkuni**

SAMLEIKI

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Rasmussen & Weihe er løggilt grannskoðanarvirki, og felagið er størsta grannskoðanarvirki í landinum. Felagið veitir tænastur til øll sløg av fyritøkum innan fyri so at siga allar vinnugreinar. Fyritøkan varð stovnað í 1968 av Carl Vilhelm Weihe, sum var einsamallur stjóri í 25 ár. Í 1993 gjørdist Klaus Rasmussen samánari, og fyritøkan broytti navn til Rasmussen & Weihe.

Nú eru nýggjar tíðir, og teir báðir omanfyrinevndu eru ikki longur í fyritøkuni, og nýggju eigararnir meta, at tíðin er búgvin til at broyta navn og búmerki.

- Navnið NOTA stavar frá latíni, og tað merkir millum annað tekn, merki og viðmerking. Vit kenna eisini orðið frá vendingini »nota bene«, ofta stytt NB, ið merkir »gev tí væl gætur«, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Endamálið hjá felagnum er framvegis at vera ein virkin samstarvsfelagi fyri kundar okkara.

- Felagið er væl fyri at taka ímóti avbjóðingunum í komandi tíðum, og við nýggja navninum ætlar felagið framhaldandi at vera fremsta grannskoðanarfyritøka í landinum, sigur felagið.

## Veðurlagspolitikkur Føroya umrøddur við danska veðurlagsráðharran

Landsstýriskvinnan í innlendismálum kunnaði í dag donsku starvssystur sína, Connie Hedegaard, um føroyoyska veðurlagspolitikkin.

Annika Olsen legði stóra áherðslu á, at talan er um eina føroyska tjóðarsemju at skerja útlátið av veðurlagsgassum við í minsta lagi 20 prosentum. Annika Olsen gjørdi vart við, at tað hevur stóran týdning, at Føroyar verða sjónliga nevndar í fyrsta uppskotinum til eina nýggja bindandi veðurlagsavtalu.

Connie Hedegaard rósti politisku semjuni í Føroyum og skilir væl føroyska ynski um sjónliggering í nýggju avtaluni. Connie Hedegaard lovaði at taka spurningin upp á hægsta politiska stigi í tí sonevndu veðurlagsnevndini hjá donsku stjórnini. Avrátt varð, at tætta samstarvið á veðurlagsøkinum heldur fram.
Innlendismálaráðið 11. november 2009